# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum
at kæra móðir okkara

**Marjun Skaale Dánjalsdóttir**
Runavík

andaðist fríggjadagin 2. desember, 67 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Berøa og út í kirkjugarðin á Nesi týsdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Dania, Hans Arni og Páll**

*Tey, sum vilja minnast Marjun, kunnu geva eina peningagávu til Føroya Felag Móti Krabbameini.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at góði pápi okkara

**Hans Jacob Justesen**

andaðist í heiminum í Klaksvík leygardagin
3. desember, 93 ára gamal.

Kistan fer úr heiminum týskvøldið 6. desember kl. 18.00 heim í Betesda.
Jarðarferðin verður úr Betesda
mikudagin 7. desember kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Maria, Karin, Sigrun, Eydna, Hjørdis, Gunvør og Heidi**

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá ið elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Peter Christian Johannesen**
vanliga nevndur Peter hjá Fritleif
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri umsorgan á G4.
Tøkk til prest og sangarar.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Tøkk fyri hjálpsemi til ervið.
Hjartans takk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Anna, Brynja, Gulbrit og Finnbogi**

Ruborg Zachariassen, Sørvágur:

# 40 ára starvsdag hjá Føroya Banka

Hósdagin 1. desember kundi Ruborg Zachariassen í Sørvági halda sín 40 ára starvsdag hjá Føroya Banka.

Ruborg er eitt kent andlit frá bankanum á Flogvøllinum, har hon arbeiddi í meira enn 39 ár. Hon var sett í starv tann 1. desember 1965, stutt eftir at Føroyaflúgvingin var byrjað miðskeiðis í 60-unum.

Síðan bankin á Flogvøllinum lat aftur 1. februar 2005, hevur Ruborg arbeitt í Føroya Banka í Sørvági. Hetta er fyrstu ferð, at hon hevur fastar arbeiðstíðir.

Arbeiðið í bankanum á Flogvøllinum hevði við sær at Ruborg hevði ógvuliga skiftandi arbeiðstíðir. Hon mátti alla tíðina laga arbeiðstíðina eftir, hvussu flogførini komu og fóru. Arbeiðið var tað einasta av sínum slagi í landinum.



Tað var fjølbroytt, og har hitti hon nógv ymisk ferðafólk. Hon trívist framvegis sera væl í bankanum.

Ruborg er ættað úr Sørvági, dóttir Jenny og Henry Davidsen, fyrrverandi bussførara. Mamman doyði í 1962, bert 42 ára gomul, og Ruborg, ið var elst av systkjunum, var sum ein mamma fyri síni yngru systkin. Hon hevur altíð verið røsk, arbeiðssom og sera nærløgd í øllum tí, hon tekst við. Í síni frítíð spælir Ruborg bridge og svimur. Eisini hevur ymisk handalig ítriv.

Ruborg var gift Joen Hendrik Zachariassen, sum eisini var ættaður úr Sørvági. Hann andaðist fyri góðum fýra árum síðan, 64 ára gamal. Tey fingu trý børn. Jens Erik, Maria Eyð og Henry. Synirnir búgva báðir í Sørvági, meðan dótturin býr í Miðvági. Ommubørnini eru 12 í tali.

# 25 ár á Apotekinum

Hósdagin 1. desember vóru liðin 25 ár síðani Jonna Hansen byrjaði í starvi innan apoteksverkið.

Jonna er útbúgvin farmaseutur, og tók 1. mai í 1988 við starvinum sum apotekari við Tjaldurs Apotek í Havn. Har er hon enn.

Í sambandi við dagin var skipað fyri hugnaløtu í matstovuni á Tjaldurs Apoteki, har starvsfelagar og onnur heilsaðu upp á jubilarin.

Jonna Hansen er 52 ár, er fødd í Sørvági, men hevur búð í Havn tað mesta av lívi sínum.

**sb.**




*Jonna Hansen varð heiðrað av starvsfelagum, tá hon hósdagin hátíðarhelt 25 ára dagin í firma'inum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Dagurin í morgin

**6. desember. Nikolaus**, deyður umleið ár 350. Hann var biskupur í Myra, sum er í Lítlaasiu. Hann varð tikin av døgum sum pínsluváttur, men við grøv hansara í Myra hendu so mong undurverkini, at hann skjótt varð roknaður sum halgimenni. *Niklasar- ella niklasmessa* hevur verið hildin í Føroyum. Og ein gomul føroysk vísa er um Niklas, har niðurlagið er: *Hjálpi mær Guð og ríki harrin, Sankta Niklas.*

Í Hálandi varð hann róptur *Sinte Klaas,* og haðani kom dyrkanin til Amerika, har hann varð *Santa Claus*, sum gevur børnunum gávur á jólum og er tann sami, sum nú á døgum verður róptur jólamaðurin. Navnið er upprunaliga grikst, sett saman av orðunum nike ið merkir sigur og laos, ið merkir fólk.

*A.C. Evensen varð føddur hendan dagin í 1874.*